# Altjóða AIDS-dagur



Í dag, 1. desember, er altjóða AIDS-dagur. Í hesum sambandi verða skipað fyri tiltøkum ymsastaðni úti í heimi. Kjakið er veruliga kyknað aftur, og nógv finnast at politikkinum hjá Vatinkaninum um at ráða frá at nýta fyribyrging, men heldur halda seg fráhaldandi frá kynsligum sambandi áðrenn hjúnarlag.

Tað fer ein framhaldandi menning fram innan heilivág, og tann stóra vónin er at finna heilivág, sum kann basa HIV-sjúkuni. Í dag hava tey góðan heilivág, sum kann virka fyribyrgjandi móti AIDS. Politikken skrivar, at tað er týdningarmikið, at sjúkan verður staðfest skjótast gjørligt, so at sjúklingurin kann móttaka heilivág skjótast gjørligt, tí at tá virkar heilivágurin best.

Í Danmark verður eitt krusifiks stillað upp frammanfyri dómkirkjuni í Keypmannahavn í sambandi við AIDS-dagin. Á krossinum hongur ein genta, sum er við barn. Listarverkið er ein atfinning móti politikkinum hjá Vatikaninum og Bush um fyribyrging. Jens Galschiøt hevur gjørt krusifiksin.

**- heinik**



SUNDA KOMMUNA

## Starvsfólk til Barnaverndartænastuna í Sundalagnum

Søkt verður eftir starvsfólki til barnaverndartænastuna at byrja 1. januar 2007, ella eftir nærri avtalu. Talan er um fulltíðarstarv.

Viðkomandi fer í tøttum samstarvi við leiðaran á deildini at taka tær av málsviðgerð av barnaverndarmálum, ið m.a. fevnir um heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við stuðlar og at seta teir í starv, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði. Samskift verður við almennar stovnar, løgreglu, skúlar, dagstovnar og dagrøkt, læknar og heilsurøktarfrøðingar.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni á Oyrarbakka og nakað av ferðing er knýtt at starvinum.

**Vit ynskja, at tú hevur**

- eina hóskandi útbúgving, eitt nú sum sosialráðgevi, námsfrøðingur ella líknandi
- breiða vitan og góðan førleika at orða teg bæði munnliga og skrivliga
- telduførleika á brúkarastøði
- evni til at arbeiða tvørfakliga.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á sosialu deild á tlf. nr. 471022 ella 771023.

Umsóknir við prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. desembur 2006, og skulu sendast til:

Sunda kommunu
Sosiala deild
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

Barnaverndartænastan er skipað í samstarvi millum Sunda-, Eiðis-, Hvannasunds-, Viðareiðis- og Húsa kommunur, og er partur av Sosialu deild í Sunda kommunu. Í hesum kommunum búgva stívliga 3000 fólk.

sansir.fo

